# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Náttúrukreftirnar gera um seg

Ikki kann sigast annað enn at hesir báðir fyrstu mánaðirnir av fyrsta árinum í komandi nýggja 10 árinum hava verið serstakliga ótespiligir fyri ikki at siga oyðileggjandi fyri mong.

Tann ringa síðan av náttúrumegini hevur verið frammi í øllum sínum veldi. Fyrst varð Haiti rakt av einum oyðileggjandi jarðskjálvta. Hundraðtúsundtals menniskju doyðu og enn fleiri vórðu skadd og mistu hús og heim. Bert stutt eftir hesa vanlukku gjørdu náttúrukreftirnar aftur vart við seg. Hesaferð í Suðuramerika. Chile varð rakt av einum tí herviligasta jarðskjálvtanum, sum er máldur á jørðini nakrantíð. Mong hava latið lív, og skjálvtin hevur lagt í oyði stór íbúðarøki serstakliga úti við strondina.

Í Europa hava náttúrukreftirnar eisini gjørt um seg. Herviligt ódnarveður hevur leikað í í Spania, Fraklandi og Týskalandi og liggja bygdir og bústøð undir í vatni. Eisini hevur ringa veðrið tarnað ferðsluni í hesum londum.

Hesir báðir fyrstu mánaðirnir av 2010 lova tí alt annað enn gott. Um okkara leiðir hava vit ikki merkt nakað til tær almáttugu náttúrukreftirnar. Her hevur tvørturímóti valdað sonn friðsæla. Veðurgudarnir hava verið við okkum, sum tikið verður til. Og tað eiga vit sjálvandi at fegnast um. Hóast Norðuratlantshavið hevur fostrað manga ódnina, so kunnu vit gleðiliga staðfesta, at vit hava verið spard fyri tær heilt stóru ódnirnar í mong mong ár. Og í eini árstíð har illveður oftani herjar hevur verið liggjandi kavi og góðveður.

Spurningurin mong seta sær er, um heimurin eru farin inn í eina øld við vaksandi náttúruvanlukkum. Jarðskjálvtar, ódnir og glopraregn hava staðið ovast á breddanum í altjóða miðlum í eina tíð. Ótti er eisini fyri, at fleiri av »sovandi« vulkanunum kring heimin vakna aftur úr dvala og fara at goysa. Mangar av yvirskiftunum geva upphitingini skyldina fyri fleiri av oyðandi náttúrukreftunum.

Náttúruvanlukkur er ikki nakað nýtt fyribrigdi. Tær eru afturvendandi. Tøkniligu framstigini á eitt nú samskiftisøkinum hava gjørt, at ein náttúruvanlukka í einum parti av heiminum bráddliga kennist so »heimlig« fyri okkum øll. Ikki meira enn hevur ein jarðskjálvti ella ódn rakt ein part av knøttinum fyrr enn vit øll eru eygleiðarar inni í okkara egnu stovum. Samskiftis- og miðlaøldin vit liva í ger, at vit uppliva tað nógva, sum hendir í fjarskotnum londum, nærum beinanvegin.

Vit kenna tað tí sum, at náttúrukreftirnar nú meira enn fyrr gera um seg. Men spurningurin er eisini, um ódnirnar veruliga eru fleiri í tali ella talan heldur er um, at tíðindini røkka so langt og koma so skjótt fram. Tó skulu vit ikki undirmeta ávirkanina frá økta $CO_2$ útlátinum, hóast fleiri hava ilt við at góðtaka tað sum ein av orsøkunum til broytta veðurlagið.

Tað hepna við tøkniligu framstigunum er, at vit kunnu fáa neyðhjálpina fram skjótari og hjálp minka um skaðan. Og her standa føroyingar avgjørt ikki aftanfyri. Soleiðis sum vit hava verið spard fyri oyðandi náttúrukreftum, so er tað ikki so løgið heldur, at vit standa í fremstu røð, tá aðrir partar av heiminum verða raktir.

**Sosialurin**

## Viðvíkjandi uppskoti til lóg um undirsjóartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Víst verður til ”uppskot til løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð”, sum er sent Kommunusamskipan Føroya til hoyringar.

Fyrst skal kommunan viðmerkja, at ein hoyringsfreist á einans er 6 dagar (frá 18. til 24.) als ikki kann góðtakast fyri eitt lógaruppskot av so grundleggjandi týdningi.

Yvirskipað er Tórshavnar positiv mótvegis hesum lógaruppskoti og ætlanini at gera tunnil millum Eysturoy og Suðurstreymoy. Kortini eru ítøkiligar greinar í uppskotinum og onnur viðurskifti, ið ikki eru nøktandi fyri kommununa, og sum kommunan noyðist at gera viðmerkingar til.

Í sambandi við § 9 vil kommunan vísa á, at tørvur er á ásetingum um trygdarliga tilbúgving, reinsan av vegavatni o.l., so at Tórshavnar kommuna fíggjarliga á henda hátt kann vera skaðaleys av hesum viðurskiftum.

Í mun til § 9, stk. 1, nr. 6, so vil kommunan mótmæla, at landsstýrismaðurin einsamallur skal góðkenna endaligu tunnilsverkætlanina og tunnilin, áðrenn hann verður tikin í nýtslu. Kommunali byggimyndugleikin tykist heilt settur til viks í hesum máli, har kommunan ikki so frægt sum er hoyringsmyndugleiki. Kommunan metir ikki, at hetta lógaruppskotið samsvarar við og kann seta til viks tær heimildir og skyldur sum kommunan hevur sambært Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytinum.

Á sama hátt vil kommunan vísandi til § 12, stk. 1 og stk. 2, mótmæla, at landsstýrismaðurin fær sær tær heimildir sum ásettar eru í Ll. Nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum, samtundis sum staðfest verður í lógaruppskotinum, at tunnilin er ikki partur av landsveganetinum. Kommunan metir, at rættartrygdin kann verða álvarsliga skeikla við slíkari lógaráseting.

Í mun til § 12, stk. 5, skal partafelagið í sambandi við íbinding í landsvegin ”gera og avhalda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum”. Ongin orsøk er til, at partafelagið, sum fær einkarrættin, ikki eisini skal rinda kommununi fyri møguligar útreiðslur í sambandi við íbinding í kommunalan veg, soleiðis at kommunan í hesum sambandi hevur javnbjóðis rættindi at verða hildin fíggjarliga skaðaleys, sum landið við hesum lógaruppskotið vil tryggja sær sjálvum.

Kommunan saknar eisini meira ítøkiligar ætlanir um íbinding í Skálafjarðartunnilin enn tað, sum framgongur av § 13 við viðmerkingum. Víst verður í tí sambandi til býráðssamtykt frá 2006, har kommunan vísandi til § 5, stk. 3, litra 6, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir krevir av P/F Skálafjarðartunnlinum og Landsverk at fáa til góðkenningar tekningar og nærri upplýsingar um, hvussu veganetið á Kalbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilinum. Á sama hátt verður víst til somu samtykt, har kommunan ynskir at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um, hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir, ið verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kalbaksvegnum og til havnina á Sundi. Viðmerkjast kann, at kommunan hevur verið í samskifti við Vinnumálaráðið, Innlendismálaráðið og Landsverk um hesi viðurskifti.

At enda vil Tórshavnar kommuna gera vart við, at tað er neyðugt í samband við hesa verkætlan, at ein endalig loysn verður funnin viðv. nýggja innkomuvegnum til Havnar, og at løgtingið ikki útsetir hesa vegagerð longur, eins og gjørt hevur verið seinastu 2 árini. Kommunan hevur nú í áravís arbeitt fram ímóti at fáa eina semju við landsvegamyndugleikarnar um nýggja innkomuvegin, men enn er ikki komið á mál. Royndirnar frá bæði Vágatunnlinum og Norðoyatunnlinum vísa, at tað verður eitt sokallað ”ferðslulop” tá slík tunnilssambond eru gjørd. Sum flestum kunnugt er trýsti á innfallsvegirnar til Tórshavn og á veganeti inni í Havnini longu í dag sera stórt. Kommunan gjørdi avtalu við landsstýrið um loysn á ferðslutrupulleikunum við verandi innkomuvegin (Hvítanesvegin) longu tá Kaldbakstunnilin varð gjørdur, men landið hevur onki gjørt fyri at loysa ferðslutrupulleikarnar har. Ongin ivi er um, at Skálafjarðartunnilin vil økja uppaftur meira um ferðslutrýsti á innfallsvegirnar til Havnar og á kommunala veganetið. Tí er avgjørt neyðugt, og ein treyt frá einum samdum býráði, at nýggi innkomuvegurin verður gjørdur í samráð við ynskir kommununar beinanvegin, og undir øllum umstøðum áðrenn Skálafjarðartunnilin verður opnaður. Tað átti at verið eyðsæð fyri einhvønn, at tað nýttar lítið at fáa eina skjóta farleið undir Skálafjørðin til Havnar, fyri so at standa í eini bilarøð við íbdindingina í kommunala veganetið. Og tað vil verða úrslitið, um hesin trupulleikin ikki verður loystur.

Boðast skal at enda frá, at hesin teldupostur verður eisini sendur Innlendismálaráðnum sum borið bræv í morgin, hin 25.02.2010

*Vegna Tórshavnar kommunu*
**Heðin Mortensen**
**borgarstjóri**

**Jákup Egholm Hansen**
**tekniskur stjóri**

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.